lív.fo

# Vælkomin til eitt nýtt LÍV

Pensjón er nakað, ið skal vera í tryggum hondum,
uttan at tær nýtist at gera nakað hóvasták.
Tað er orsøkin til, at tú hevur eitt pensjónsfelag.
Harvið slepst undan stúran.
Men tað krevur álit.

## Eitt LÍV við áliti

Á LÍV eru vit greið yvir, at álit kundans ikki kemur av sær sjálvum. Álitið skal mennast og staðfestast. Okkara kundar skulu hava eitt pensjónsfelag, sum er í støðugari menning og áhaldandi bjóðar nýggjar og betri tænastur. Tænastur, ið gera pensjónina meira viðkomandi.

## Vit hava eitt greitt mál

Vit hava sett okkum fyri at geva kundum okkara betri innlit í, hvørji útlit teirra eru. Tí eru vit farin undir eina tilgongd, ið stigvíst ger tað lættari hjá tær at fáa yvirlit yvir tína pensjón.

## Stig 1: Vit taka okkum av tínum pensjónspappírum

Í fyrsta stigi hava vit lagt tíni pensjónspappír út á okkara kundaportal. Harvið sleppur tú undan at hava skjølini í tjúkkum ringbindum. Ístaðin fert tú inn á liv.fo og fært lættari, skjótari og betri innlit í, hvussu tín pensjón er skipað. Alt er lagt fram – lætt og greitt.

Stig 1 – Kundaportalur
Stig 2 – Seniorskipan
Stig 3 – Marknaðarrenta
Stig 4 – Frítt íløguval
Stig 5 – Pensjónsnýskipan

LÍV
Innlit í útlit